# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg savnaði pengar til eina ætlan um at myrða Jimmy Carter, forseta*
*(Khalid Sheikh Mohammed)*

# – Eg skipaði fyri 11.9.2001

**Pakistanin Khalid Sheikh Mohammed hevur viðgingið, at hann var heilin aftan fyri atsóknina at World Trade Center og Pentagon.**



*Khalid Sheikh Mohammed: -Eg legði alt álopið 11. september í 2001 til rættis*

– Eg havi ábyrgdina av atsóknini 11. september í 2001, og eg legði alt til rættis.

Orðini standa í einari frágreiðing, sum stavar frá avhoyringum í fangaleguni í Guantanamo. Har er Khalid Sheikh Mohammed endurgivin fyri at siga, at tað var hann, sum legði atsóknina 11. september í 2001 til rættis. Franska tíðindastovan AFP veit at siga, at frágreiðingin bleiv lisin upp fyri Khalid Sheikh Mohammed, og at hann segði seg ikki hava nakrar viðmerkingar til innihaldið.

Í frágreiðingini sigur Khalid Sheikh Mohammed, at hann var við til at leggja fleiri aðrar yvirgangsatsóknir til rættis. Millum annað var hann uppi í atsóknini at World Trade Center í 1993 og bumbuatsóknini á indonesisku oynni Bali.

Hann skal eisini hava verið uppi í fleiri ætlanum um at myrða nakrar av heimsins leiðarum so sum Jimmy Carter, Bill Clinton og Jóhannes Páll páva.

### Ætlaði fleiri álop

Í frágreiðingini verður Khalid Sheikh Mohammed eisini endurgivin fyri at siga, at hann hevði ætlanir um fleiri yvirgangsatsóknir beint aftan á 11. september í 2001. Millum málini vóru háhúsini Library Tower í Kalifornia, Sears Tower í Chicago, Plaza Bank í statinum Washington og Empire State Building í New York. Bretska útvarpið BBC sigur, at Khalid Sheikh Mohammed hevði eisini ætlaðir um at søkja at Big Ben og Heathrow-flogvøllin-um í London.

Men tað vóru ikki bara mál í USA og Bretland, sum vóru álopsmál. Í frá-greiðingini hjá Pentagon sæst, at Khalid Sheikh Mohammed hevði ætlanir um at spreingja eina bumbu í Panamaveitini, og at ætlanir eisini vóru um at spreingja stór tangaskip í Suezveitini, Gibraltarsundinum og Hor-muzsundinum við Persa-flógvan.

# Hann kann taka øll á bóli

**Tað kann væl henda, at næsti franski forsetin fer at eita Francois Bayrou**

Tær seinastu vikurnar hava franskir fjølmiðlar skrivað um møguleikarnar hjá Nicolas Sarkozy og Ségolene Royal at vinna forsetavalið, sum verður í næstum, men nú er eitt triðja navn komið á breddan.

Navnið er Francois Bayrou. Hann er í miðjuni í fronskum politikki, og júst tað kann vísa seg at vera hansara styrki, tá saman um kemur, siga politiskir eygleiðarar í París. Teir halda, at nógvir fransmenn eru troyttir av tí áralanga keglinum millum vinstra og høgra, og hesum kann Francois Bayrou fáa gagn av valdagin.

Fyri bara einari viku síðani var hann fleiri prosentstig aftan fyri tann borgarliga Nicolas Sarkozy og sosialistin Ségolene Royal, men nú er munurin tódnaður burtur í einki. Tann seinasta meiningakanningin vísir, at Sarkozy og Royal fáa stuðul frá ávikavist 28 og 25 prosent av veljarunum, og at 24 prosent siga seg ætla at velja Baurou. Men tað áhugaverda er, at meðan undirtøkan hjá teimum báðum fyrru er minkað, er undirtøkan hjá Bayrou vaksin seks prosentstig ta seinastu vikuna.

Tí eru summir eygleiðarar í Fraklandi farnir at tosa um, at kanska fær franska forsetavalið eitt óvæntað úrslit.



*Francois Bayrou. Verður hann franskur forseti?*

## STUTT SAGT

### Svara við hermegi

Iran fer at svara við hermegi, um USA ger av at søkja at iranskum málum fyri at noyða landið at sleppa sínum kjarnorkuverkætlanum. Tað sigur samráðingarleiðarin hjá iranska stýrinum, Ali Larijani. Spurdur, hvussu Iran fer at svara einum amerikonskum hernaðar-álopi, svaraði Larijani stutt, at eitt hernaðarligt álop verður svarað við hermegi. Amerikanska stjórnin hevur fleiri ferðir avsannað, at hon ætlar at brúka hermegi ímóti Iran, men USA hevur kortini savnað fleiri herskip í Persa-flógvanum, teirra millum tveir flogberar.

### Byggja á jørð hjá øðrum

Ein triðingur av teimum jødisku niðursetubygdun-um á Vestara Áarbakka eru bygdar á jørð, sum pal-estinskir einstaklingar eiga. Tað er niðurstøðan í einari frágreiðing, sum friðar-felagsskapurin „Friður Nú“ hevur skrivað. Fyrr hevur verið hildið, at umleið 40 prosent av teimum jødisku niðursetubygdunum standa á palestinskari privatogn, men sambært teirri nýggju frágreiðingini er talan um góð 32 prosent. Felagsskapurin sigur, at upplýsingarnar í frágreiðingini byggja á upp-lýsingar frá ísraelska her-valdinum, men tað avsannar ísraelska stjórnin.

### Hámarksferð á autobahn

Leiðarin á umhvørvis-deildini hjá ST vil hava týsku myndugleikarnar at seta mark fyri, hvussu skjótt bilar kunnu koyra á teimum týsku motorveg-unum, teimum sokallaðu autobahn. Achim Steiner sigur við blaðið Berliner Zeitung, at týsku bilførar-arnir noyðast at átaka sær ábyrgd av umhvørvinum og teirri veksandi dálkingini, og at tað kann gerast við at seta hámarksferðina á motorvegunum niður. Sum er er einki mark fyri, hvussu skjótt bilar kunnu koyra eftir teimum týsku motorvegunum, og hóast fleiri áheitanir úr ymsum ættum hava myndugleikarnir framvegis ikki sett nakað hámark á.